STUDNI
Student Grant Fund

SØK STUDNING FRÁ STUDNA VIÐ MÍNBOKS

Byrjar tú nýggja útbúgving, er tað skjótt og lætt at søkja umvegis Mínboks. Mínboks er ein persónligur postkassi, sum bert tú hevur atgongd til og har tú kanst søkja beinleiðis um lestrarstudning.

Bílegg brúkara til Mínlykil og Mínboks
Fyri at stovna tær Mínboks, er neyðugt at tú byrjar við at bíleggja Mínlykil.

Mínlykil kann bíleggjast við at fara inn á www.minlykil, trýst á Bílegg Mínlykil, og fylg mannagongdini har.

Tá Mínlykil er stovnaður og verksettur, kanst tú rita inn á www.minboks.fo og harvið gjøgnumføra stovnanina av Mínboks.

Á hesi síðuni: http://www.studni.fo/Default.aspx?pageid=21563 kanst tú fylgja vegleiðingum – eisini videovegleiðingum – um, hvussu tú bíleggur, verksetur og søkir um studning við Mínlykil.

Les meira um Mínlykil og Mínboks á www.minboks.fo .

Møguligt er eisini at nýta "gamla" netbanka-login.

Soleiðis útfyllir tú talgilda umsóknarblaðið

1. Far inn á Mínboks á www.minboks.fo.
2. Innrita við Mínlykil.
3. Trýst á “Útfyll oyðublað” og trýst á “Studni”
4. Vel “Lestrarstudningur í Føroyum”.
5. Fyll teigarnar út (nú verður tú vegleidd/-ur ígjøgnum umsóknarblaðið).
6. Hav viðheftu skjølini tøk. Øll viðheft skjøl skulu vera í pdf-sniði.
7. Set √ í “Eg vátti undir trúnaðartreytum” og trýst á “Send”.
8. Umsóknin fer nú til skúlan, ið skal vátta, at tú ert lesandi við skúlan.
9. Síðani verður umsóknin viðgjørd á Studna.